VIÐMERKINGAR

# Náttúruvanlukka

**Heri Mohr**



Tann syndarliga og óhugnaliga náttúruvanlukkan í Asia 2. jóladag í fjør fór sum snarboð um allan heim í somu løtu, avleiðingin av jarðskjálvtanum norðan fyri Sumatra var veruleiki. Takkað verið framkomnu samskiftismøguleikum, sum sjónvarp og edv (e-mail), vórðu samkenslu- og hjálpitiltøk upp á stutta tíð sett í verk í at kalla øllum framkomnum londum á ein slíkan hátt, at allir gluggar fóru upp á víðan vegg, og lýggjar og fjálgar kenslur - næstakærleikin - vann á slavtoku sálarinnar: Ósannindi, øvund og maktgirnd .

Náttúruvanlukkur hava altíð verið og fara altíð at vera, so leingi jørðin er til, og um vit fara langt aftur í tíðina, so hava slíkar vanlukkur valla haft stórvegis ávirkan á mannalívið uttan bert har, sum náttúran í ólukku mát vísti sína megi. Samskiftið tá í tíðini var ikki annað enn bátur og skip.

Fyri 121 árum síðani var ein náttúruvanlukka við suðurendan á Sumatra, sum hendan 2. jóladag var við norðurendan, men munurin er tann, at tá var einki radio, sjónvarp, edv og illa nokk telefon til, so ilt er at ímynda sær, hvussu ræðuligt fólkið har hevur haft tað - ætlandi við ongari hjálp yvirhøvur.

Um hesa náttúrukatastrofu kunnu vit lesa í Den Store Danske Encyklopædi: Krakatau er vulkanoyggj í Sundastrætinum millum Java og Sumatra. Hon er serliga kend fyri ta stóru, eksplosivu spreingingina í 1883. Vulkanin hevði tá ikki gjørt vart við seg í umleið 200 ár. Fyrst í árinum 1883 hevði oyggin fleiri gos, og 20. mai fór vulkanin at goysa. 26. og 27. august hendi nøkur eksplosiv gos, øll oyggin eksploderaði við miklari megi, og tað mesta av oynni hvarv í havið. Eksplosiónin hoyrdist 4800 km til Australia, og trykkaldan varð registreraÐ á barometrum um alla verðina. Í sambandi við eksplosiónina komu 40 m høgar flóðaldur, sum gjørdu stóran skaða: 115 bygdir vórðu lagdar í oyði, og meira enn 36000 fólk lótu lív, stórar mongdir av vulkanskari øsku vórðu tveittar upp í atmosferuna og køvdu økið í 3 dagar. Støvkenda evnið (materiale) fór við vindinum um allan knøttin og doyvdi sólargeislarnar so mikið, at tann globali miðaltemperaturin fall uml. 0.5 stig, celsius.

Síðani 1927 hava áhaldandi gos gjørt eina nýggja aktiva vulkan, Anak Krakatau, sum merkir Krakataus barn.

# Rúnarbundin konsert

**Heri Mohr**



Fyri kortum sóu og hoyrdu vit í Sjónvarpi Føroya eina frálíka konsert, sum varð hildin av Eivør og Bourne í Mullers Pakkhúsi tann 2. januar í ár. Eingin ivi um, at bæði tvey skoraðu fleiri av teimum 6 møguligu stjørnunum. Verri gekk hjá SvF, sum umframt onkra stjørnu eisini skoraði eitt løgið spursmálstekn. Mentanarstovnurin hevði nevniliga fráboðað á skermi og í bløðunum, at ein "Rúnarbundin Konsert við Eivør!" var á skránni nakrar ferðir, og hetta gevur orsøk til spursmálið: Hvat ella hvør er ein Rúnarbundin Konsert?

Í teirri føroysku orðabókini finna vit orðið rúnabinda/rúnabundin, og tað er kanska hetta orðið, ið sjónvarpið hevur ætlað at knýtt til "Konsert", og sum fekk okkum at líkjast einum spursmálstekni, tí veruleikin er tann, at flest øll - bæði í pakkhúsinum og heima í stovuni - sótu rúnabundin og lurtaðu eftir sanginum og tónleikinum, sum SvF hevur navngivið "Rúnarbundin Konsert".

Ljóðfrøðiliga er navnið í lagi, tað liggur væl á tunguni og er eggjandi, men hvussu skal hetta - við ella uttan r - skiljast?

Ein góð konsert kann rúnabinda fólk, men ein konsert kann ikki vera rúnabundin. At fáa hana rúnabundnað krevur meira enn gand og gott handalag.

Rúnabundin konsert, rúnabundin sjónleikur v.m. er eins høpisleyst sum sólbrend sól - væl at merkja, um tað ikki snýr seg um torskildan, heiðursvirdan skaldskap, sum bert tey fáu við vitan og serkunnleika duga at skilja.

P.S.: Heppin var tystur maður, ið kom fram á keldu!

Í Sosialinum 22.01.05. lesa vit á síðu 3, at í Norðoyatunnlinum er heppin kelda !??

# Rúsdrekkasølan í Føroyum

**Hans Birgir Hansen**



Rúsdrekkasølan við sínum 6 deildum eigur at vera umskipað sum heilsølur í bert flýggja út til loyvdu skeinkistøðini og til handlar í fáa loyvi at selja rúsdrekka!

Øll privatsølu frá Rúsdrekkasølu við sínum 6 deildum eigur at vera steðga tað ongantí ovskjótt av Vinnumálaráðnum og vit skula hava skerpað 18 ára aldursmarki!

Blaðkioskir/handlar skula ikki fáa loyvi at selja til tey í eru undir 18 ára aldursmarki tá vit skula avmarka slíkar sølur og rúsdrekkaskaðar ungdómar í Føroyum!

Vit skula hava samskipa alla kunning - upplýsing um vandar við ovirnýtslu av rúsdrekka innan almanna verkir/ myndugleikar/vøldir/felagsskapir/v iðgerarstovnar!

Loyvisnevndin skal javnan vitja loyvdu skeinkistøðini uttan nakra fráboða fyri at kanna eftir um loyvishavarar yvir halda síni skeinkiloyvir/útskeinkjarnir!

Vit skula hava løgregluna javnan at patrulera gjøgnum býin og hava eftirlit við loyvdu skeinkistøðum og fullum børnum/ungdómum/tilkomin í ganga drukkin í býnum!

# Útlendingamálið - onkur sigur ósatt

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**



Útlendingamálið hevur verið væl lýst í seinastuni í fjølmiðlunum, seinast hósmorgunin í útvarpssendingini "Føroyar í dag". Og mín niðurstøða er, at tað er onkur sum ikki sigur sannleikan, antin landsstýrismaðurin Jógvan við Keldu, ella embætisfólk hansara.

Í sendingini siga embætisfólkini, at hava útlendingar arbeiði, so er talan um ein formalitet at fáa longt arbeiðsloyvi og hetta tekur í mesta lagi nakrar vikur. Samstundis sigur ákærin hjá fútanum, Hesselberg, at danski myndugleikin í so at siga øllum førum eftirlíkar tí sum føroyska innlendismálaráðið kemur fram til.

Hví skulu so hjúnini Raba í Vestmanna bíða upp móti einum ári at fáa longt sítt arbeiðsloyvi?

Hesin spurningurin er enn ikki svaraður. Undarførslan er, at landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu ikki úttalar seg um einstøk mál. Hendan siðvenjan er tó ikki heilt fastgrógvin í sitandi samgongu, tí Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, úttalaði seg um lítla Petur, men tá var kanska bert talan um eitt lítið verjuleyst barn. Eg spyrji bara.

Lat okkum kalla ein spaka fyri ein spaka. Eg skilji væl Jógvan við Keldu, um hann óttast ov nógvar útlendingar í Føroyum.Visti slett ikki av at yvir 1000 útlendingar eru her og fleiri túsund aðrir ynskja at koma hendanvegin. Fleiri túsund útlendingar, sum ynskja at flyta til Føroyar, tí her er betri materielt at vera enn í heimlandinum, kann gerast ein trupulleiki hjá okkum føroyingum, sum ikki telja 50.000 sálir. Um føroyingar eru skeptiskir, koma ov nógvir útlendingar til landið, so hevur tað einki við fremmandahatur at gera, men er heldur ein spurningur um sunna fornuft.At ein hvør er sær sjálvum næst er ikki serliga kristiligt, men er vanliga góðtikið sum gott latín millum manna og hevur verið ein av fyritreytunum fyri undankomu mannsins gjøgnum øldirnar.

Hvussu tey flestu av okkum hugsa djúpt inni í okkum sjálvum, kom sjónliga fram í eini blaðsamrøðu undirritaði hevði við ein maskinmeistara ættaður úr Nólsoy, eg hitti hann umborð á skipi niðri í Hamburg fyri fimm árum sína. Hann segði: "At míni børn, mín kona og eg hava tað gott, tað er tað, tað heila snýr seg um." Hesin var føroyingur, búsitandi í Føroyum, skattgjaldari í Føroyum, men í starvi hja dønum og kanska júst hansara starv troðkaði onkran dana burtur, sum nú gekk arbeiðsleysur. Men tað er ein heilt onnur søga, ið hoyrir aðrari sjálvrannsakan til.